Norðuratlants-bólkurin til Føroya

Norðuratlantsbólkurin við Kuupik Kleist, Lars Emil Johansen og Tórbjørn Jacobsen kemur til Føroya at halda fundir um vikuskiftið

Tann nógv umtalaði tingbólkurin í Fólkatinginum við føroyskari luttøku kemur til Føroya um vikuskiftið at halda kunnandi fundir.

VITJAN
Heri á Rógvi

Norðuratlantsbólkurin kemur til Føroya á vitjan um vikuskiftið. Bólkurin er mannaður av teimum trimum Kuupik Kleist, Lars Emil Johansen og Tórbjørn Jacobsen. Sum flestum kunnugt eru teir báðir, Kuupik Kleist og Lars Emil Johansen, valdir á fólkating í Grønlandi. Kuupik umboðar og Lars Emil umboðar Siumut, sum er at meta sum grønlendski Javnaðarflokkurin. Afturat teimum í Norður-atlansbólkinum er Tórbjørn Jacobsen, sum er varamaður fyri Høgna Hoydal á fólkatingi. Bólkurin fer um vikuskiftið at halda tveir kunnandi fundir, har kunnað verður um virksemið hjá bólkinum og hvørjar ætlanir bólkurin hevur fyri framtíðina.

Hildnir verða tveir fundir. Fyrri fundurin sunnukvøldið kl. 20 í Norðurlandahúsinum, har Lena Andersen og Niclas Johannesen eisini fara at spæla. Seinni fundurin verður mánakvøldið í Róðrarneystinum hjá NSÍ í Runavík. Hesaferð vera tað Jónsvein og Birgir, sum fara at taka sær av undirhaldinum.

Umframt teir báðar almennu fundirnar, so verður eisini hildin ein tíðindafundur mánamorgunin. Eisini fær teir báðir, Kuupik Kleist og Lars Emil Johansen, at hitta ymsar lyklapersónar í Føroyum.

Vitjanin hjá teimum báðum grønlendsku politikarunum er komin í lag í sambandi við, at bólkurin vil kunna um sítt virksemi. Fyri kortum var Tórbjørn Jacobsen í Grønlandi.

Grønlendsku gestirnir fara eftir ætlan avstað aftur týsdagin.

Vika 10 – 6. mars
Vinnaratøl: **05 - 10 - 11 - 19 - 36 - 45**

Eykatøl: **42 - 44**

6 vinnaratøl:	**3.499.354,- kr.**
5 vinnarat.+ eykatal	**47.497,- kr.**
5 vinnaratøl:	**3.780,- kr.**
4 vinnaratøl:	**129,- kr.**
3 vinnaratøl:	**41,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

www.sosialurin.fo

VALUTAKURSIR

		06.03.02	Ultimo februar
USA	**Dollarar**	853,0400	855,9800
Bretland	**Pund**	1213,3400	1219,8900
Svøriki	**Króna**	82,2100	81,9800
Noreg	**Króna**	96,4300	96,0800
Sveits	**Frankur**	503,2600	503,4600
Ísland	**Króna**	8,4300	8,4900
Kanada	**Dollari**	537,1300	533,1500
Japan	**Yen**	6,4702	6,3856
	Evra	743,1700	743,1600

FØROYA SPARIKASSI

KROSSORÐ



Vinnari:

Rakul Thorsteinsson
Marinargøta 24
188 Hoyvík

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: TOKUTALA



Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

293

Loysunar-orðið: .....

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- **Føroya jarðfroði** - *Jóannes Rasmussen*
- **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt

HEILSANIR

Góða Beinta
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum í dag, kvinnudagin, ynskja
omma og abbi á Landavegnum

Góði svágur
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum.
Okur Í Glyvrinum og Í Heygunum

Hey, Hassadi
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum í dag. Alt tað besta í framtíðini.
Heilsan, Jon Bon Jovi

Rúni í Jansagerði
Góði sonur og beiggi, hjartaliga tillukku við 26 ára degnum 6. mars. Ein heilsan til Marinu, sum fylti 23. febr. Alt tað besta í framtíðini ynskja
vit í Gillagøtu 18

Góða Miriann
Hjartaliga tillukku á 25 ára degnum. Her sært tú súr út, vónandi er lagið blivið betri nú tú ert blivin vaksin.
Heilsan, ein gamal kaffivinur

Góða systir og svigarinna
Hjartaliga tillukku við prógvinum.
Okur Í Heygunum og Í Glyvrinum

Henda lekra gentan fyllir 25 ár 7. mars. Er hon ikki fitt? Hjartaliga tillukku við degnum.
Kærar heilsanir, myndatakarin

Góða Miriann
Hjartaliga tillukku á 25 ára degnum. Hav ein góðan dag.
Heilsan, ein vinur

Góði, elskaði beiggi
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 7. mars. Eisini ein heilsan til ommu, ið fylti 28. febr. Vit elska tykkum.
Heilsan, Angeleen, Dagny og Anita

Góða mamma
Hjartaliga tillukku við degnum tann 6. mars. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
Heilsan, Anja og Sonny

Góði, elskaði Ronni
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 7. mars. Jesus pápi signi framtíð tína.
Bestu heilsanir, mamma og babba

Tillukku við 60 ára degnum og prógvinum.
Nick og Ansa

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:

Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**